# Stór oljudálking í Vági

**DÁLKING** Í alla nátt hevur gassolja fossað úr einum tanga hjá SEV í Vági. Sjálvvirkandi skipanin virkaði ikki, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV

Randi Jacobsen

Klokkan hálvgum níggju í morgun boðaði SEV í Vági avvarðandi myndugleikum frá, at nógv olja var farin á sjógv.

Oljan var likin á sjógv líka frá klokkan eitt í nátt, til óhappið varð uppdagað.

SEV hevur eina sjálvvirkandi skipan, sum pumpar olju úr goymslutanganum í dagtangan, og henda skipan hevur ikki virkað, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Tískil fleyt yvir.

Gudmund Kacobsen, sløkkiliðsleiðari í Vági heldur tað vera torført at siga nágreiniliga, hvussu nógv olja er farin á sjógv, tí nøgdin er so stór. Eitt skot er 30.000 litar, men nøgdin kann vera størri ella minni, sigur Gudmund Jacobsen.

## Oljan farin víða

Fólk frá Vágs havn hava lagt sperringar út á fjørðin, men oljan er farin allan vegin inn og liggur í fjøruni og fram við bryggjunum.

Oljan er gassolja.

– Í dag spælir veðrið við okkum. Tað er lýtt og gott veður, og oljan dampar tí skjótt, sigur Gudmund Jacobsen.

– Skipanin er ikki nóg góð, tá ið slíkt hendir. Vit fara nú at kanna, hví óhappði hendi, og vónandi kunnu vit læra av hesum, sigur Hákun Djurhuus.

SEV hevur sett fólk at leita eftir brekinum, og ein stór kanning verður gjørd av óheftum fólki, sum hava serkunnleika til slikar skipanir.

Fyri nøkrum árum síðan hendi eisini eitt oljuóhapp hjá SEV í Vági. Ta ferðina misti verkið tungolju á sjógv, og uppruddingin vardi í fleiri mánaðir.

Einki samband er millum tey bæði óhappini hjá SEV í Vági, tí hesa ferð misti verki gassolju á sjógv.

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu drúgv uppruddingin verður.

Kostnaðurin er tí ókendur.

Meginreglan er, at dálkarin rindar fyri uppruddingina





*Oljan rekur frá Sev og yvir móti bryggjuøkinum nokkso beint yvir um fjørðin*

*Myndir: Dagfinn Olsen*


Móttøka

Í sambandi við at Ruborg Zachariassen hevur sín seinasta starvsdag í Føroya Banka, verður móttøka á deildini í Miðvági mánadagin 17. mai 2010 millum kl. 15.00 og 16.30.

Ruborg byrjaði í starvi 01.12 í 1965 og hevur starvast í deildum bankans á Flogvøllinum, í Sørvági og Miðvági.



FØROYABANKI

www.foroya.fo


# Petur Karl leggur frá sær

**LANDBÚNAÐUR** Petur Karl av Rana í Trongisvági vil av við festið, men maðurin, sum hann hevur peikað út til eftirmann sín, fær ikki fígging til festið

Randi Jacobsen

Í longri tíð hevur brotið í bæði borð uttan um bóndan Petur Karl av Rana í Trongisvági.

Tað byrjaði við, at hann fyri tveimum mánaðum síðan varð meldaður fyri misrøkt og djórapínslu, og nakað eftir meldaði Djóraverndarfelagið Petur Karl av Rana fyri djórapínslu, við tað at hann kappaði ein bein av einum lambi av og læt lambið liva.

Hesi málini eru ikki avgreidd, men nú hevur Petur Karl av Rana boðað frá, at hann vil lata festið frá sær.

Í tí sambandinum vóru Bjørn Patursson, stjóri á Búnaðarstovuni og Rólvur Djurhuus, landbúnaðarráðgevi mikudagin á fundi við Petur Karl av Rana.

Festið er ikki tikið frá Peturi Karl av Rana, sum tí kann peika á sín eftirmann.

## Skikkaður

Búnaðarstovan skal góðkenna eftirmannin. Bjørn Patursson vil ikki upplýsa hvør ætlaði eftirmaðurin er, men hann sigur, at maðurin bæði hevur landbúnaðarútbúgving og royndir.

Útpeikaði eftirmaðurin er Jón Eli Nolsø í Trongisvági. Hann sigur í stuttari viðmerking, at tað í løtuni ikki er upp á tal, at hann skal yvirtaka festið. Annars hevur hann onga viðmerking.

Frá væl vitandi keldum hevur Sosialurin frætt, at trupulleiki hansara er fígging. Eingin fígging fæst úr Búnaðargrunninum.

Við tað at Petur Karl av Rana vil av við festið, hevur Mjólkarvirkið Búnaðarmanna sent sms til allar neytabøndurnar og lýst neytini hjá Peturi Karl av Rana til sølu. Sum skilst er talan um umleið 70 neyt.

Málið um djórapínslu liggur hjá politinum.



*Petur Karl av Rana kom serliga í andglettin av lambinum, sum hann kappaði beinið av*